## Boys In A Band gera um seg



Eftir nakrar slakar vikur fyri føroyskan tónleik á 15 teimum bestu, gera Boys In A Band nú ein vørr. Lagið Super Contagious blandar føroyskan tónleik upp í topp 5. Besti nýggi bólkur á Planet Awards heldur sostatt á við at sannføra. Hetta er annars eitt av bert tveimum føroyskum løgum á listanum hesa vikuna. The Dreams og lagið Babu á 10. plássi er hitt lagið. Samstundis roynir Føroya tyngsti rokkbólkur, Sic, seg við eykalagnum To Dare To Risk To Regret. Nelly Furtado og lagið All Good Things Come To An End liggur aftur hesa vikuna ovast á listanum.

## Popplist eigur enn ovasta pláss

Á sølulistanum yvir fløgur hjá tónleikahandlinum Expert í SMS er føroyskur tónleikur vælumboðaður. Ovast liggur enn Popplist 5, meðan Knúsandi Løgur við Flemming er á øðrum plássi. Endurstovnaða boybandið Take That eigur 3. pláss frammanfyri nýggjastu útgávuni hjá Hanus og Aldubáruni, Frá Leddiken. Martin Joensen og Hinir á 5. plássi og víkingamálminum hjá Týr á 7. plássi eru hini føroysku umboðini á listanum.

# Byin.fo hevur ikki snýtt Toll og Skatt



29/09/2006 08:44 441011 HALLUR POULSEN SIDE 01

Toll- og Skattstova Føroya **TOLLKVITTAN**

Nummar : 2330416

Innflytari

SP/F HALLUR POULSEN
512 NORÐRAGØTA
FØROYAR

Skrásetingartal.......: 534609
Avgreiðsludagur.....: 12.02.2007
Avgreiðsluháttur....: VANLIG TOLLAVGREIÐSLA

Arkivnummar............: 1237K
Høvuðsrokningsnr........: 2330416

Góðsnummar............: 1048417
Avskipingarhavn..........: HANSTHOLM
Avskipari....................: Netcar-eu

Vøran komin tann........: 12.02.2007
Flutningsfelag............: P/F SMYRIL BLUE WATE
Flutningsfar..............: NORRØNA
Uppskipingarhavn........: TÓRSHAVN
Farmabræv nr. ..........: 714741777249
Farmaskrá nr. ...........: 249
Bruttovekt..................: 4.000
Merki..........................: CH. 124375
Kolli............................: 1
Vøruheiti.....................: HUMMER LIMOSINE

**UPPHÆDDIN FRAMKEMUR SOLEIÐIS:**

Tollur ..............................kr. [redacted]
Innflutningsgjald...................kr.
Avgjald (% av tollvirði+toll) kr.
Avgjald (+ kr. pr. eind)......... kr.
Meirvirðisgjald......................kr.
Avgreiðslugjald.......................kr.

**Goldið íalt**.........................kr. [redacted]

Váttað verður hervið, at upphæddin er goldin.

12.02.2007

Toll- & Skattstova Føroya

*Á kvittanini sæst, at MVG og GATT-tollur er goldin, upphæddirnar eru goymdar eftir ynski frá eigarunum*

**Tá Hummer limousinan varð flutt inn í landið, var bæði MVG og GATT-tollur goldin. Innflytarin skilur ikki, hví Akstovan hevur upplýst fyri Sosialinum, at talan var um brot á § 25 í løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992 um skrásetingargjald á motorakførum v.m.**

BILAR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hallur Poulsen, greiður frá at, talan er um eina misskiljing úr enda í annan. Byin.fo setti seg í samband við Hall, tí teir vistu, at hann plagdi at innflyta bilar. Hetta var mikudagin 7. februar og fyrispurningurin var, um hann kundi fáa teimum eina Hummer limousinu til Føroyar við Norrønu leygardagin 10. februar. Hóast talan var um knappar vendingar, so gekk hetta. Hallur fann eina Hummer Limousinu í Týsklandi og keypti hana. Hallur legði út fyri hana, og tók sær somuleiðis av kostnaðinum fyri øll avgjøld.

– Tá bilurin kom til Føroyar við Norrønu, legði Norrøna at í Klaksvík og eg rindaði eg bæði GATT-toll og MVG. Týski eigarin hevði boðað mær frá, at pláturnar kundu brúkast í øllum Evropa, og tá Akstovan ikki hevði tíð til at gera sýnið beinanvegin, hugsaðu vit, at vit kundu koyra við útlendsku plátunum, inntil Akstovan hevði tíð til at gera sýnið. Tað, sum vit ikki vistu var, at hóast pláturnar vóru lógligar, so var tað bert eigarin, sum hevði loyvið at koyra við bilinum, og áðrenn bilurin varð skrásettur í Føroyum, stóð eigarin at vera upprunaligi týski eigarin, greiður Hallur Poulsen frá.

Løgreglan hevði sostatt fullan rætt til, at steðga bilinum, tí tað var skeivur bilførari, ið koyrdi hann. Men Hallur heldur, at tað er sera óheppið, at tað er lagt fram, sum um talan var um óreglusemi við avgjøldum.

– Eg havi goldið øll avgjøldini, og Byin.fo hevur endurrindað mær alt, so tí er tað uppspunnið, um Akstovan ber fram, at talan er um annað.

Í gjár vistu eigararnir at siga, at Limousinan, ið stendur í Gøtudali, eftir at Løgreglan steðgaði henni sunnumorgunin, fær føroyskar plátur í morgun.



*Hummer Limousinan hevði týskar plátur, tá hon kom til landið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Jógvan Hansen gongur sigursgongd

**Jógvan Hansen heldur fram í X-Factor, meðan hin luttakarin við føroyskum tilknýti, føroyskt gifti Siggi, varð sendur heim, nú einans 8 luttakarar eru eftir í best umtóktu sjónvarpssending í Íslandi nakrantíð**



*Siggi t.v. mátti lúta, meðan Jógvan t.h. slapp víðari til næsta umfarð*

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Jógvan Hansen er nú millum tey 8 síðstu í íslendsku útgávuni av X-Factor kappingini, ið er nógv tann best umtókta sendingin í íslendskum sjónvarpi nakrantíð. Við flestum áskoðaraatkvøðum kom Jógvan uttan trupulleikar víðari fríggjakvøldið, greiðir heimildarmaður okkara í Reykjavík, Jens Guð frá.

– Jógvan sang Leave Right Now hjá Will Young, men tað var so langt frá, at hann noyddist at gera, sum sangurin beyð, tí Jógvan er heilt tryggur orsakað av, hvussu væl dámdur hann er. Serliga millum konufólk er hann vorðin ein sonn superstjørna, sigur Jens Guð.

– Eg var saman við míni 76 ára gomlu mammu og vitjaði hennara 83 ára gomlu systir í vikuskiftinum. Vit sótu og hugdu at sjónvarpi. Tá ein lýsing X-Factor kom, fóru tær at tosa um, hvussu fittur Jógvan sær út, so hann hevur breiðan tokka. Tær báðar duga ikki at sms'a, so tær fáa ikki atkvøtt, men tær yngru kvinnurnar eru dúgligar at atkvøða, sigur Jens Guð.

– Tann, ið varð sendur heim hesa vikuna æt Siggi. Siggi hevur virkað í Føroyum sum trúboði fyri nøkrum árum síðan, har hitti hann konu sína Ranvá Olsen í Havn. Ranvá flutti við honum til Íslands. Siggi plagdi at vera sangari í einum tungmálms bólki, tá hann var yngri, og hann hevði nógvar fjepparar. Fleiri av hesum vóru í øðini, tá hann varð sendur heim.

Nú eru somikið fáir luttakarar eftir, at teir allir eru sera dugnaligir og í hvørjum føri er talan um smá frávik, ið avgera hvør verður verandi og hvør verður sendur heim, greiðir Jens Guð frá.